myrkursins ríki heldur ikki summarfrí. So tá møtir, barnamøtir o.l. halda summarsteðg, so er rætt at minna hvønn annan á, at raðfesta rætt, meðan vit halda summarfrí, tí Heilagi Andin fylgist við okkum, líkamikið hvar vit eru og hvar vit fara.

Tað er ein sannroynd, at ofta tá møtivirksemið byrjar aftur, so er eitt dølskni komið inn, og mann skal líkasum trekkja alt uppaftur í snúningsferð. Og hetta er eitt úrslit av minni andaligum virksemi – sagt uttan fordøming, men av sannroynd.

So eg hugsi, at boðskapurin sunnudagin var sera viðkomandi, og er altíð aktuellur. Jesus sigur í Matt. 6,33: „Nei søkið fyrst ríki Guds og rættvísi Hansara! So skal alt hetta verða givið tykkum umframt!“ Lívið lærir okkum, at tá vit raðfesta Heilaga Andans lív fram um alt annað, so gera vit okkum eina stóra tænastu, tí Heilagi Andin er virkin og ávirkar tankar og sinn, so guddómligar hugsanir vaksa fram í huga okkara; og tá hugsi eg ikki bert um tá vit eru á møti ella biðja, men í tí dagliga. Sjálvt eitt vanligt innkeyp gongur betur, tá Heilagi Andin er aktivur í huga okkara. Og soleiðis eisini tá vit eru úti og ferðast: Alt gongur betur, tá Andans lív er raðfest; og her hugsi eg ikki bert um at biðja og lesa, men at brúka okkara høgt elskaðu tungutalu.

Tá vit ferðast leggja vit alt til rættis, og taka avgerð um hvat skal takast við á ferðina. Eingin velur at lata fartelefonina liggja eftir heima, oyrabúffar og líknandi mugu við, og summi taka onkra bók, so onkur løta fer til at lesa. Eg vil eggja øllum at taka bíbliu við og góðan lovsang, sum stimbrar okkara andaligu sansir. Flest okkara nýta Bíbliuna á fartelefonini, men pappír Bíblian er eitt gott reiðskap, so vit kunnu notera í og strika undir fyri at gerast meira tilvitaði um týdning av tí, sum vit lesa. Eg upplivi regluliga, at verða mintur á ymiskar opinberingar, sum eg havi fingið gjøgnum ár og dag, tí eg havi noterað tað í Bíbliuna.

So lati okkum øll verða tilvitaða um, at velja hin góða lutin hetta summar, so Andans kraft kann vaksa og virka í okkum líkamikið hvar vit eru og hvat vit gera.

Við hesum orðum ynski eg øllum eina góða summarfrítíð, og eg tali Harrans signing yvir teg og tykkum, bæði tey sum verða heima og tey, sum fara at ferðast.

tj

STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

Samkomuleiðslubólkurin

Filadelfia
„Himmal á jørð“

Maria hevur valt hin góða lutin

Luk. 10. 42: Maria hevur valt hin góða lut, og hann skal ikki verða frá henni tikin

Á familjumøtinum 22. juni undirvísti Katy sera gott um at velja hin góða lutin, og vísti samstundis á, at Marta ikki var nøkur vánalig systur ella kristin, men tað handlaði um raðfestingar í lívinum. Tá tú lesur hendingina, sum verður lýst í Lukas 10, so kundi ein freistast til at hugsa, at dagligt strev skulu vit lata liggja, og heldur brúka alla okkara tíð til at lesa í Bíbliuni. Og fyri ein, sum ikki tímir so væl tað praktiska arbeiði, kann hann bara lata alt liggja og so heldur lesa í Bíbliuni ella lurta eftir talum o.l., meðan tey, sum stríðast fyri, at alt skal vera ruddiligt og ordiligt eru óandalig.

Men hetta er als ikki so, og tað vísti Katy á; tann fatanin er ein stór misskiljing. Vit hava øll fyri neyðini at arbeiða, halda skil á húsi og heimi, viðlíkahalda ognir okkara, vinna okkum pening við at arbeiða o.s.fr. Men Jesus vísir í hendingini í Lukas á, at talan er um raðfesting, og soleiðis er allan vegin

í lívi okkara; at vit mugu sjálvi raðfesta. Um vit raðfesta urtagarðshald, so sæst á urtagarðinum, at hann er vælhildin og vakur. Um vit raðfesta Heilaga Andans lív, so merkist at andaligi ávøkstur okkara veksur og ger lív okkara vakrari (fyri at samanbera).

Nú er summartíð og summarfrítíðin er aktuel fyri flest øll; og tá plaga vit at minna hvønn annan á, at Guds ríkið fer ikki í summarfrí, eins og Gud, Jesus og Heilagi Andin heldur ikki halda summarfrí. Og tíanverri heldur

JULI 2025

Leygardagur	5.		**Reingerð:** Ingun
Sunnudagur	6.	Kl. 11.00	**Morgunmøti v. breyðbróting** Møti- og kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður Ábyrgd/leiðari: Tummas J. Lovsongsleiðari: Tummas J. Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Ragnar Talari: Ása O.
Mánadagur	7.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd: Ása
Mánadagur	14.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd: Anna
Mánadagur	21.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Anna-May
Leygardagur	28.		**Reingerð:** Karin

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

BARNAMØTINI

byrja aftur 31. aug. kl. 11.30

Samkomudagur á Brúnni í Skálavík

Sunnudagin 7. september verður samkomudagur, har vit fara at hugna okkum saman frá morgni til kvølds.

Vit gleða okkum til dagin, har ommur, abbar, foreldur og børn, fara at verða saman ein heilan dag, bara við hugna.

Vit fara at eta saman, spæla saman, dansa og syngja saman og hugna okkum max.

Hesin dagurin er fyri alla familjuna.

Okkurt til børnini



Drongur kom til Jesus, fimm breyð hann bar,
tveir smáar fiskar hann gav honum har.
Breyðini fimm og fiskarnar tveir,
Jesus hann takkaði og signaði teir.

Tá var kraftarverkið í hondum hans,
matur drongsins rakk tá til fimm túsund mans.
Jesusi gávur tínar gev tú nú,
eingin gleðist meira enn tá júst tú.